## Eingin hóttir Rosenborg

Rosenborg, sum er mótstøðuliðið hjá NSÍ í Evropa League, vann aftur í norsku landskappingini um vikuskiftið. Við máli í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, varð Rade Price stóra hetjan móti Vålerenga, tá hann legði sítt lið á odda. Úrslitið gjørdist 2-1. Rosenborg er oddaliðið í bestu norsku deildini við 38 stigum. Molde er á øðrum plássinum við 31 stigum.



## Malsom er umbiðin

Sam Malsom, framherji hjá B36, avdúkar í samrøðu við enska Herald Express, at útlendskt feløg hava víst honum áhuga. Talan er serliga um feløg í Svøríki, sigur hann. Hann hevði fingið ymisk tilboð undan hesum kappingarárinum, men hann vísti B36 álit. – Eg vil fegin fáa meira fyrsta-liðs fótbólt í føroysku landskappingini og Europe League. Vónandi kann eg halda fram við at spæla væl og skjóta mál fyri B36, sigur Sam Malsom við blaðið.




# Nervarnir fóru við bronsuvónini

**Føroyska borðtennislandsliðið glepsaði væl og virðiliga eftir Grønlandi, men í avgerandi løtunum vantaði neyvleikin**




Jákup Mørk

Hóast føroyska borðtennislandsliðið ikki longur telur sterkar profilar, sum hava fingið sína uppaling í donskum borðtennisumhvørvi, so eru heiðursmerki á oyggjaleikunum í ferð við at gerast ein realistisk vón.

Í øllum førum var tað í gjár so sera nær við, at føroyska liðið vann kanska týdningarmesta dystin í bólkaspælinum.

Saman við Grønlandi er eingin ivi um, at Føroyar stríðast um plássið sum nummar tvey í bólki B, men eftir harðan dyst máttu okkara ásanna, at tey gjørdust akkurát ov stutt.

Og tað var kanska fyrst og fremst í tvímansleikinum, at tað kiksaði.

Hjá kvinnunum spældu Henrietta Nielsen og Rakul Mikkjalsdóttir ein sera góðan dyst móti grønlendska parinum. Men hóast hesar í longum løtum vórðu trýstar í botn, so endaði alt við einum greiðum 3-0 sigri til Grønland.

Rakul og Henrietta høvdu annars tveir settbóltar í fyrsta settinum, og í tí triðja høvdu tær tríggjar av slagnum. Men tær grønlendsku megnaðu hvørja ferð at svara aftur, og so dugdu tær at taka møguleikan, tá hesin beyðst.

Og sum so var søgan tann sama við blandaða tvímansleikinum, har Rakul saman við Ragnari Egilsson vardi føroysku litirnar.

Fyrsta settið vann okkara par greitt, men hóast tey í triðja settinum løgdu út við at koma upp á 7-1, so megnaðu tey ikki at gera arbeiðið liðugt.

Undan hesum hevði Rói Agnarsson annars styrkt um føroysku vónina við at vinna á sterkasta grønlendska spælaranum, men hetta varð at kalla til fánýtis, tá tað akkurát ikki gekk í tvímansleikunum.

Føroyska vónin er nú, at Isle of Man megnar at basa Grønlandi, og tað er hesum, sum tað nú verður farið eftir í føroysku leguni.

**FAKTA**

**Føroyar spældu tveir dystir í liðkappingini í borðtennis sunnudagin:**
Føroyar-Grønland 3-4
Føroyar-Rhodos 7-0

**Dystir mánadagin**
Kl. 9: Føroyar-Guernsey
Kl. 12: Føroyar-Isle of Man
Kl. 16: Føroyar-Hetland

**Sunnudagin varð fyrsta liðkappingin í skjóting. Kappast var í greinini Sporting:**

| | |
|---|---|
| 1. Ynes Mon | 83 stig |
| 2. Cayman | 78 stig |
| 2. Heltand | 78 stig |
| 7. Føroyar | 64 stig |

**Kappast verður aftur mánamorgunin, tá liðkappingin í skett byrjaði klokkan 7. Men hendan var ikki liðug fyri evstamark okkara.**